# Semja

Semja:

**Heilsuhjálparafelag Føroya (HHFF)**

**og**

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið (KAF)**

**Sáttmálaskeið**
Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðarskeiðið frá 1. oktober 2024 til 1. oktober 2025.

Hækkingar í løn:

- Lønin hækkar 4,75% tann 1. oktober 2024

Aðrar broytingar í sáttmálanum eru galdandi frá 1. í mánaðinum, eftir at sáttmálin er undirskrivaður, við undantakið av teimum broytingum har gildiskoman er serstakt ásett.

Broytingar í sáttmálanum:

**§ 4. Løn**
Nýtt stk. 2a Arbeiðstíð út yvir 8 tímar um dagin verður samsýnt sum úrtíðarløn.

Nýtt stk. 8. Tá 4 vikurs skeiðið samb. stk. 4 er farið, verður uppgjørt, hvussu nógv heilsu-/heimahjálpari hevur arbeitt. Hevur fastløntur heilsu-/heimahjálpari arbeitt meira enn ásetta tímatalið, verður meirarbeiðið lønt við tímaløn, sum er 1/2080 av árslønini. Harafturat verður latin samsýning fyri ólagaliga arbeiðstíð. Meirtímar er arbeiði ímillum setanarbrøk og fulla tíð.

Fyri arbeiðið út yvir 8 tímar um dagin, verður goldin úrtíðarløn, sum er 50% eyka av vanligu lønini.

Heilsu-/heimahjálpari avger sjálvur, um hann vil hava úrtíðina útgoldna í løn ella avspákaða. Boðað eigur at verða frá avspáking, áðrenn arbeiðsætlan verður løgd. Avspáking verður løgd í samráð við leiðaran.

Restin av ásetingunum í § 4 verða óbroyttar.

**§ 6. Viðbøtur**
Stk. 6 Gjald fyri summar- og frítíðarlegur:

Løn verður latin, sum fyri vanligan arbeiðsdag, tó í minsta lagi 8 tímar.

Fyri gerandisdagar verður latin eykaviðbót svarandi til kvøldviðbót fyri 16 tímar um samdøgrið.

Fyri leygar-, sunnu- og halgidagar og serstakar frídagar verður latið tað tvífalda av omanfyri nevndu gerandisviðbót. Treytin fyri at nýta hesa avtalu er, at talan er um eina frammanundan avtalaða og avmarkaða tíð, og at veruliga er talan um leguupphald. Kvøldviðbótin er eins og ásett í lønartalvuni hjá Føroya Pedagogfelag.

Restin av ásetingunum í § 6 verða óbroyttar.

*Tórshavn, tann 26. mars 2025*

**Heilsuhjálparafelag Føroya**

Mary Antonsdóttir
forkvinna

Ragna Vilhelmsdóttir
næstforkvinna

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

Per Martin Gregersen
formaður

Bjarni Prior
næstformaður

Anita Fuglø
leiðari